# Fimleik og svimjing sama vikuskifti

Blaðunga Birita Debes úr Rituvík, sum setti nýtt føroyskt junior met í 50 metrar ryggsvimjing sunnudagin, svam ikki bara um vikuskiftið. Leygardagin luttók hon nevniliga eisini í Føroyameistarakappingini í fimleiki fyri lið, har hon umboðar Støkk í kvinnuunglingum. Bara eitt lið var í hesi kappingini, so tað var ikki beinleiðis torført at vinna, men tað er onki at ivast í, at Birita Debes hevur ov mikið at gera við ítróttini.



# Birita Debes juniormet

Ein av svimjarunum, sum fekk nógv burturúr í gjár, er Birita Debes úr Rituvík. Hon setti nýtt juniormet á 50 metrum rygg við tíðini 29.71 minuttir. Hetta er eitt vet skjótari enn skjótasta tíðin hjá henni frammanundan, sum var 29.97, sum hon megnaði at fáa á Oyggjaleikunum á Álandi í summar, har hon eisini vann gull. Av teimum fimm hópunum til kappingar komandi árið, sum seinasti møguleiki var at vinna sær pláss til í gjár, er Birita Debes partur av trimum av teimum.



**Í løtuni er Pál Joensen í eini uppbyggjandi fasu, har hann svimur ímillum 80 og 120 kilometrar um vikuna**

Mynd: Álvur Haraldsen

# Pál skjótastur í heiminum

Við tíðini 14:48 minuttir svam Pál Joensen leygardagin skjótastu tíðina í heiminum á 1500 metrum í frísvimjing síðan 1. august 2009, tá svimjiárið 2010 byrjaði.

Hetta er somuleiðis skjótasta tíðin nakar hevur svomið 1500 metrar í Føroyum. Og Pál Joensen, sum í løtuni er skjótari enn hann var um somu tíð í fjør, er greiðir yvir, at tað gongur honum væl í løtuni.

– Tað sær fínt út. Eg svam ein fínan 1500 metur í gjár. Og nú fara vit til World Cup kappingar í Evropa komandi vikurnar, og eg eri nummar eitt í heiminum beint nú. Tað verður hørð kapping í øllum kappingunum nú, men eg fari at gera tað besta eg kann beint nú, sigur Pál Joensen.

Komandi vikurnar verða World Cup kappingar í Moskva, Stokkhólmi og í Berlin, og til hesar kappingarnar eru vánirnar hjá Páli rímiligar.

– Russar hava nakrar góðar á langum teinum, men eg vóni at fáa eitt medaljupláss í Moskva. Til Stokkhólm veit eg nøkulunda, hvør verður við, og svimja teir til bestu tíð, so má eg forbetra meg eitt sindur, greiðir Pál Joensen frá.

## 120 kilometrar um vikuna

Pál Joensen nýtir ikki meira tíð upp á svimjing, enn hann hevur gjørt, tí tað er døgnið ov stutt til, men hann venur øgiliga hart í løtuni.

– Vikurnar liggja ímillum 80 og 120 kilometrar í hylinum, og tað ber illa til at svimja meira, áðrenn tað verður ósunt, greiðir Jón Bjarnason, venjari hjá Páli Joensen frá.

Skal svimjingin umgerast til renning, so svarar orkan til umleið 400 kilometrar.

Jón Bjarnason leggur afturat, at hann hevur góðar vónir til Pál komandi veturin, og at málið er at vinna EM í desembur.

-eij



# 23 bjóða

**Um vikuskiftið var seinasti møguleiki at kvalifisera seg til fýra kappingar og eina venjingarlegu komandi mánaðirnar í svimjing. Heili 23 ymiskir svimjarar megnaðu at verða úttiknir**




Eirikur í Jákupsstovu

**Myndir: Álvur Haraldsen**

Tríggir svimjarar til World Cup, sekstan til landsdyst ímóti Íslandi, fimm til juniormeistarastevnu í Bergen, fimm til Evropameistarakapping á stuttgeil og sekstan til venjingarlegu í Íslandi til Reykjavík International kappingina.

Hetta var úrslitið, eftir at seinasti møguleikin fyri úttøku vóru til kappingarnar til januar 2010. Nakrir svimjarar ganga aftur til ymisku kappingarnar, og tí samsvara tølini millum kappingar og luttakarar ikki heilt.



**Hjá teimum vaksnu er lítil breidd av svimjarum í løtuni, men tey, sum svimja, klára seg heilt væl**